# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

## Andlát

2. juli
Jonna Nielsen, Sandavági, 64 ár.
Lorenz á Krákusteini, Argir, 64 ár.

Marna á Kamarinum Tórshavn, 71 ár.

3. juli
Paula Guttesen, Tórshavn.

4. juli
Harry Debes, Oyri, 59 ár.

5. juli
Gunnar Christiansen, ættaður av Skála, 56 ár.

6. juli
Jóan Jákup Jacobsen, Sørvágur, 44 ár.

7. juli
Magnus í Hoyvík, 71 ár.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og tað hjálpsemi, ið varð sýnt okkum, tá okkara høgt elskaði sonur, beiggi, svágur, mammubeiggi og drongur

**Emil Fróði Olsen**
**Toftir**

so brádliga bleiv tikin frá okkum, og fór til gravar.

Takk til Meinhard Bjartalíð og Sverra Steinhólm fyri troystarrík orð í heiminum og kapellinum, og Magdu og Mai-Britt fyri vakran sang.
Takk til Martin Restorff Jacobsen prest fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk til Sigmund fyri flógv og troystandi orð, sum hann sendi av Flemich Cap.
Ein hjartans tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til á ymiskan hátt.
Takk fyri kransar, blómur og samkenslukort.
Eisini takka vit øllum tykkum, sum hugsaðu um okkum hesar dagar, ringdu og vitjaðu inn á gólvið.
Ein hjartans tøkk til tann stóra skara, sum tollaksmessudag fylgdu Emil til hansara seinasta hvíldarstað.

*Hjartans tøkk øll somul.*

**Óli, Thurid, Annika, Herit við familju og Inga Maria**

# 2-1 til Doulos á Tórsvølli



**Meðan trúboðanarskipið Doulos vitjaði í Føroyum, var ein fótbóltsdystur á Tórsvølli millum eitt altjóða lið av skipinum og eitt lið av føroyingum úr ymiskum samkomum**

Í hálvleikinum var støðan 1-0 til Doulos, og dysturin endaði við at teir vunnu við tveimum málum móti einum.

Á føroyska liðinum vóru: Alex Jacobsen, Klaksvík, John Andreasen, Tórshavn, Leivur á Lakjuni, Fuglafjørður, Ragnar Mouritsen, Hoyvík, Robert Larsen, Porkeri, Petur Mortensen, Argir, Jóhan V. Gunnarsson, Tórshavn, Pætur Jakobsen, Tórshavn, Ásbjørn V. Gunnarsson, Tórshavn, Bárður Christiansen, Tórshavn, Karl Robert Vang, Tórshavn, Leivur R. Joensen, Tórshavn, Mikkjal Hvannastein, Kaldbak, Rúni Hvannastein, Kaldbak. Dómari var Dánial Petersen, Tórshavn.

Mikkjal og Rúni Hvannastein vanta á myndini.

Á liðinum hjá Doulos var ein føroyingur, Sámal Jacobsen av Viðareiði, sum fyrr hevur siglt við Doulos. Ragnar Mouritsen og Karl Robert Vang á føroyska liðinum hava eisini siglt við Doulos.

Í teirra trúboðanararbeiði hevur Doulos altíð eitt fast fótbóltslið, sum vanliga spælir ímoti einum liði í landi, har sum skipið kemur.

Fyrireikarnir takka nevndini í Tórsvølli fyri, at teir fingu loyvi at nýta vøllin.

# Guðrun á konsert og nýggjari fløgu

**Guðrun Sólja Jacobsen skal í summar spæla á tveimum festivalum í Danmark, og hon skal eisini hava tríggjar konsertir saman við Prinsens Livregiment**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Guðrun Sólja Jacobsen skal leygarkvøldið spæla á eini konsert í Løkken, sum liggur nærindis Århus, og seinni í hesum mánaðinum skal hon hava tvær framførslur á tónleikafestivalinum á Langeland.

Í august mánaði fer føroyska songkvinnan at hava tríggjar konsertir saman við Prinsens Livregiment. Hesar konsertir verða í Aalborg, Hjørring og Ejer Bavnehøj.

Umframt uppgávurnar á palli, skal Guðrun eisini geva eina nýggja fløgu út í heyst. Innspælingar eru gjørdar, og á fløguni verður eitt savn av kendum balladum.

## Føðingar

27. juni fingu Jórun og Jan Andreasen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3000 gr.

29. juni fingu Betina Eriksen og Michael Brodersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

29. juni fingu Sóley H. Hammer og Uni Oknadal, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3750 gr.

30. juni fingu Vanja F. í Stórustovu og Jógvan Hanus Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3410 gr.

1. juli fingu Óluva Poulsen og Ian Skylv Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2950 gr.

2. juli fingu Margit B. Nielsen, Tórshavn og Jóhan Ziskason,Tórshavn ein son. Hann vigaði 1380 gr. og var 38,5 cm. langur.

5. juli fingu Sólja Jóanisdóttir, Sandavági, og Kjartan Mohr, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3450 gr.

5. juli fingu Bjørg Danielsen og Karl Erik Sigvardsen, Argjum, tríburar, tveir synir og dóttur. Gentan var 44 cm long og vigaði 2305 gr, annar drongurin 45 cm langur og vigaði 2415, hin 43 cm langur og vigaði 1830 gr.

6. juli fingu Mildrið og Tórður Nielsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4600 gr.

7. juli fingu Armgarð og Hans-Martin á Regni, Toftum, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3300 gr.

7. juli fingu Eydna Olsen og Ken Zachariasen, Argjum, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3700 gr.

7. juli fingu Durita Berthelsen og Fríði B. Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3100 gr.

7. juli fingu Dagny Holmsen og Herman Jespersen, Vestmanna, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3750 gr.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Mogens Tilsted Christensen 60 ár



Í dag, leygardagin 10. juli 2004, fyllir sóknarpresturin í Norðurstreymoy, Mogens Tilsted Christensen, búsitandi í Hvalvík, 60 ár.

Mogens Tilsted Christensen er upprunaliga útbúgvin keypmaður. Hann arbeiddi sum sjálvstøðugur húsameklari í Århus og seinni sum stjóri í húsaognarfelagnum Zentilla ApS í Århus frá 1969-1987.

Hann var ráðgevi hjá byggifelagnum Provinsbyg A/S frá 1987-1991.

I 1992 byrjaði hann sum 48 ára gamal, meðan hann hevði annað arbeiði, at lesa gudfrøði. Tá hann varð liðugur í 2002, fekk hann starv í Føroyum sum sóknarprestur í Norðurstreymoy, og býr hann saman við familjuni í prestagarðinum í Hvalvík.

Mogens er føddur í Thy nærhendis Hantsholm og vaks upp har í 50-unum.

Í sínum ungu árum kom hann nógv saman við KFUM-fólki og missiónsfólki har á leiðini.

Hann er giftur við Annu, sum er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur við Skt. Lukasstiftelsen, og arbeiddi hon í mong ár sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Síðan tey komu til Føroya, hevur hon verið heimagangandi prestakona og hjálpt manninum í sínum starvi.

Tey eiga tríggjar døtur, sum eru ávikavist 19, 25 og 33 ár. Tann elsta er gift og eigur trý børn.

Í løtuni er famlijan í summarfrí í húsum sínum í Viborg. Sunnudagin skal Mogens hava tvær gudstænastur í tveimum ymiskum kirkjum har.

29. juli skal hann halda ólavssøkugudstænastuna í dómkirkjuni í Havn.

Føðingardagurin verður hildin saman við familju og vinfólki á Marinaen í Hvalpsund í Norðurjútlandi.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi og abbi

**Gunnar Christiansen**
ættaður av Skála, búsitandi í Reykjavík

andaðist 5. juli 2004, 56 ár.

Jarðarferðin verður úr Fella og Hólakirkjuni mikudagin 14. juli kl. 13.30.

*Vegna tey avvarðandi*

**Frida og Elisabet v/ familju**

Tey, ið vilja minnast Gunnar kunnau lata eina gávu á konto í Føroya Sparikassa nr. 142365-9

## 70 ár

Í dag, 10. juli, halda Jytte og Magnus Magnusson, Fuglafirði, 70 ára føðingardag. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Ann og Drago, Innandalsvegur 12, kl. 19.00.

## Brúdleyp

Í dag, 10. juli, kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Berghild Bjarkadóttir Skúvadal og Klæmint Mittún. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum.

Í dag, 10. juli, kl. 15.00 giftast í Saron á Viðareiði, Joan Sørensen, Hvannasund og Bárður Jakobsen, Viðareiði. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Norð.

## Prógv

Jonhard Eysturskarð, ættaður úr Fuglafirði, hevur tann 29. juni lokið prógv sum civilverkfrøðingur innan bioteknologi á Danmarks Tekniska Universitet.

Rakul Hansen, Saltangará, hevur 25. juni á Københavns Socialpædagogiska Seminarium lokið prógv sum pedagogur.

Kristian Hansen, Klaksvík, hevur við Teologiska Fakultetið í Keypmannahavn tikið prógv sum cand. theol.

25. juni fekk Maria Joensen úr Vági prógv sum Civiløkonom á Syddansk Universitet í Sønderborg.

## Navnabroyting

Súsanna Helmsdal, f. Jóhannesen, hevur broytt eftirnavn til í Stórhúsi.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kærimaður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Daniel Jacob Konrad Holm**

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til sjúkrasystrarnar og heimahjálpirnar, sum vóru um hann ta tíð, hann var sjúkur.
Eisini vilja vit takka Andrew, Páll, Svenning og Per fyri vøkur og troystarrík orð, og til tykkum tríggjar, sum sungu í Hebron.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Zarepta og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Josefina, Norðleif, Súsanna og Johild**

Fyri 25 árum síðan:

# Prógv sum stýrimenn í 1979



*28. juni 1979 fingu 14 stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla, teir vóru:*
*Marius S. Hansen, Funningur, Jákup Suni Niclasen, Tórshavn, Torbjørn Durhuus, Vestmanna, Ziska F. Ziskason, Hoydalar, Regin í Gerðinum, Vestmanna, Helgi Vestergaard, Tvøroyri, Jónsvein Lamhauge, Rituvík, Dávur Magnussen, Kvívík, Hans Jacob Bech, Vágur, Jógvan Páll Poulsen, Kirkja, Annfinn E. Mortensen, Klaksvík, Poul Eli Hansen, Søldarfjørður, Poul Danielsen, Tórshavn, Johan Nicolai Dam, Porkeri, Kristian Olsen, Gøtugjógv, og Ragnar Torbjørnson Hentze, Tórshavn.*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Hjørleif Johansen**
**Hovi**

doyði og varð jarðaður.

Starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi og B5, tøkk fyri tíðina, tit vóru um hann.
Tøkk tit, ið hjálptu til við jarðarferðini, og øll tit, ið vitjaðu inn á gólvið, ringdu og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Missiónshúsið og kirkjuna í Hovi.

*Fyri tey avvarðandi*

**Karin, Kristin, Mai, Oddbjørg og Sámal**